# Gunnar vann trygt



*Myndir: Álvur Haraldsen*

**SÚKKLING** Gunnar Dahl-Olsen vann trygt í fjallasúkklukappingini MTB-Criterium

Uni Holm Johannesen





Gunnar lá fremst undan kappingini. Hann hevði 22 stig. Í hølunum vóru Andrass Joensen og Torkil Veyhe.

Hesa ferð varð kappast á økinum í Hoydølum í Havn.

# Fleyr vann greitt



**FLOGBÓLTUR** Fleyr vann 3-0, tá Ternan vitjaði í høvuðsstaðnum í gjár

Uni Holm Johannesen

Settúrslitini vóru 25-17, 25-7 og 25-19.

Fleyr lyftir seg við sigrinum upp á sama stigatal sum SÍ, sum er oddalið. Fleyr hevur hinvegin spælt ein dyst meira.

Ein landskappingardystur er á skránni í kvøld. Tá fær Mjølnir vitjan av KÍF.

*uni@sosialurin.fo*

# Rubeksen-brøðurnir á veg til Noregs



**FÓTBÓLTUR** Tað er felagið Volda í Møre og Romsdal í vestur-Noregi, sum ætlar at knýta Tummas Hans Rubeksen og Hendrik Rubeksen at hópinum

Heri Simonsen

Heimasíðan nernett.fo skrivar soleiðis um brøðurnar úr Havn.

– Teir føroysku landsliðsspælararnir Hendrik Lamain Rubeksen (27) og Tummas Hans Rubeksen (24) verða til reiðar at spæla við Volda Fotball, áðrenn komandi vikuskiftið.

– Í besta føri verða teir klárir til innandura-KM, Kretsmesterskapet, sum er lokala meistaraskapið, sum verður í vikuskiftinum, sigur Johan Roppen, sum erleiðari í VTI Fotball.

– Hendrik Lamain Rubeksen er fastur maður á føroyska A-landsliðnum, og lítlibeiggin Tummas hevur spælt á føroyska U21-landsliðnum. Bosmans-spælararnir, spælarar uttan sáttmála, koma úr HB Tórshavn, sum er størsta felagið í Føroyum, sigur John Roppen, sum ikki nevnir B71, har Tummas Hans hevur spælt seinastu mánaðirnar.

John Robben leggur afturat, at hann vænta tað fer at verða gott, tí tað besta við sáttmálanum er, at hann kostar ikki felagnum nakað.

At sáttmálin verður veruleiki avhongur nógv av Hødd, fyrrverandi felagið hjá Rógva Jacobsen. Hødd kann kanska bjóða brøðrunum ein fulltíðarsáttmála.

– Vit hava ikki ráð at løna spælarunum. Tað longsta, vit kunnu strekkja okkum, er til eitt ferjukort, sigur Johan Robben.

Hann heldur ikki, at Hødd kann bjóða Hendriki og Tummas Hans meira enn Volda.

– Hvussu nógvar fulltíðarspælarar hevur Hødd?, spyr Johan Robben.

Volda spælir í triðbestu norsku deildini.

*heris@sosialurin.fo*

## Eik-ligan *kvinnur*

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNIÐ | TAPT | VUNNIN SETT | TAPT SETT | MUNUR | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | SÍ | 6 | 5 | 1 | 15 | 7 | 8 | 10 |
| 2 | Fleyr | 7 | 5 | 2 | 17 | 10 | 7 | 10 |
| 3 | Mjølnir | 6 | 4 | 2 | 15 | 7 | 8 | 8 |
| 4 | ÍF | 6 | 4 | 2 | 12 | 8 | 4 | 8 |
| 5 | TB | 6 | 3 | 3 | 12 | 13 | -1 | 6 |
| 6 | KÍF | 6 | 2 | 4 | 8 | 15 | -7 | 4 |
| 7 | Dráttur | 6 | 1 | 5 | 9 | 16 | -7 | 2 |
| 8 | Ternan | 7 | 1 | 6 | 7 | 19 | -12 | 2 |